Eru vit ikki fittir? Mamma okkara er reinur boxari. Um tú vilt eiga okkum, ring so 447832 ella 282877

Sethúsaklædningur

Plastik er á goymslu

Slitsterkur & viðlíkahaldsfríur

pf Klement Petersen

Høgaból • 600 Saltangará • tel. 447560 • fax 448460

GER KVETTIÐ!

Fyrstafloks seyðahegn
50 m X 90 cm
6 tráða

Yvir og undirtráður 3mm
Millumtráður 2,5mm
Meskavídd
B. 15cm H. 14cm til H. 22cm
Galvanisering 240 g/m²

Einans kr. 375,-

Fa. H.J. Michelsen
tlf. 314414 - 263707

Summarhjálp á Ferðaráðnum

fram til 1. september 2002

Til ferðafólkakunningina verður søkt eftir m/k at byrja skjótast gjørligt. Starvið er fulltíðarstarv, við skiftandi vaktum.

Vit vænta, at tú hevur:

- góðan kunnleika til í minsta lagi føroyskt, danskt og enskt
- innlit í nýtslu av teld
- initiativ og ikki smæðist

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Landsstýrið og Starvsmannafelagið. Skrivlig umsókn skal vera ferðaráðnum í hendi í seinasta lagi 21. mai 2002.

Ferðaráð Føroya
Postsmoga 118
110 Tórshavn

Leiðari til Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir leiðara til Føroya Barnaheim at byrja 1. juli 2002 ella skjótast tilber.

Føroya Barnaheim er sjálvsognarstovnur. Á Barnaheiminum er í løtuni ein Ungdómsdeild við 6-7 børnum. 7 starvsfólk eru á deildini. Á Barnaheiminum er harafturat skrivstovuhjálp og húsavørður hálva tíð. Verandi leiðari er fyribilssettur.

Frá 1. august í ár verður sett á stovn Familjudeild, har foreldur og børn kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Væntandi kunnu upp til 4 familjur vera á deildini í senn. Í lýsing í blaðnum í dag verður søkt eftir 10 starvsfólkum til deildina.

Ætlandi verður eisini ein Smábarnadeild latin upp í næstum at taka ímóti børnum frá 0-12 ár.

Føroya Barnaheim er ein stovnur, sum við umsorgan, eygleiðing og viðgerð skal virka fyri at skapa trygg og mennandi kor fyri børn, ung og foreldur, meðan tey eru á heiminum. Hetta skal gerast í tøttum samstarvi við familjuna, barnavernd, stovnar og fakfólk annars við tí endamálið at geva innskrivandi barnavernd betri møguleikar at meta um støðuna hjá barninum/familjuni og møgulig framhaldandi hjálpartiltøk.

Leiðarin hevur fakligu, fyrisitingarligu og fíggjarligu ábyrgdina av stovninum.

Tíðandi partur av starvinum sum leiðari er samstarv við avvarðandi, barnaverndir, myndugleikar, skúla, ansingarstovnar, heilsuverk umframt fakfólk og onnur, ið varða av barninum/familjuni.

Dentur verður lagdur á, at tann, ið settur verður, hevur góð leiðaraevni, hevur áræði og dugir at ganga nýggjar leiðir, dugir at samstarva við ymisku fakbólkarnar og at skapa eitt mennandi umhvørvi fyri tey, sum búgva á heiminum, og starvsfólkini.

Til starvið krevst útbúgving sum sálarfrøðingur, pedagogur, sosialráðgevi við eftirútbúgving innan leiðslu og familjuterapi ella onnur líknandi útbúgving. Dentur verður lagdur á starvsroyndir.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Fríðu Patursson á telefon 319727 eftir kl. 17.00.

Skrivlig umsókn við prógv, viðmælum, v. m. skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 27. mai 2002.

Stýrið fyri Føroya Barnaheim
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

Bilur við skaða til sølu

Ein Peugeot 106 Diesel, 3 hurðar, árg. 18/7-2001 við skaða aftan til sølu. Eykalutir fylgja við.

Til sølu fyri hægsta boð yvir kr. 55.000,–.

Tlf. 449613 ella 217200
(Yrkadagar eftir kl. 18.00)

Starvsfólk til Føroya Barnaheim

Søkt verður eftir 10 starvsfólkum til nýggju Familjudeildina á Føroya Barnaheimi, sum væntandi letur upp tann 1. august 2002 – 9 teirra fulltíðarstørv og eitt hálvtíðarstarv.

Haraftrat verður søkt eftir einum starvsfólki at arbeiða fulla tíð á Ungdomsdeildini á Barnaheiminum.

Familjudeildin verður deild, har familjur kunnu búgva í styttri tíðarskeið. Staðið er ætlað familjum, har foreldur av ymiskum orsøkum illa megna at røkja uppgávuna sum foreldur, og har mistrivnaður er í familjuni.

Endamálið við uppihaldinum er at fáa greiði á, hvørja styrki og hvørjir trupulleikar, familjan hevur, og hvussu hon best kann stuðlast framyvir. Somuleiðis er endamálið, at foreldrini verða styrkt og stuðlað í tí at vera foreldur, og at familjan sum heild verður hjálpt at koma í betri menning.

Uppgávurnar á Familjudeildini fevna m.a. um:

1) At eygleiða og lýsa foreldraførleikar og meta um menningarmøguleikar hjá foreldrum og samstundis eygleiða og lýsa, hvussu børnini eru fyri.

2) Familjuviðgerð, har dentur verður lagdur á, at hvør einstakur í familjuni fær møguleika at menna seg og koma at trívast betur, og at familjan sum heild kemur at virka betur.

Væntandi verður eisini ein nýggj Smábarnadeild latin upp á Barnaheiminum í næstum. Deildin skal taka ímóti børnum í aldursbólkinum 0-12 ár. Umframt taka ímóti børnum, sum hava bráðfeingis tørv á einum uppihaldsstað, er deildin ætlað til stytri eygleiðingaruppgávur. Endamálið við hesum er fyrst og fremst at geva barnaverndini, ið innskrivar barnið á Barnaheimið, betri møguleikar at meta um menning barnsins og møguligan tørv á framhaldandi hjálpartiltøkum.

Um hendan deildin verður latin upp, verða trý av omanfyrinevndu starvsfólkum flutt til hesa deildina. Nærri kann tosast um hetta í eini møguligari samtalu við umsøkjararnar.

Førleikakrøv
Søkt verður eftir einum sálarfrøðingi at starvast hálva tíð, familjuterapeutum, pedagogum o.ø., ið hava relevanta útbúgving ella royndir til at taka sær av børnum og foreldrum í kreppu.

Lønar og setanartreytir
Størvini verða sett sambært sáttmála ímillum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Miriam Johannesen, settur leiðari á Barnaheiminum.

Umsóknarfreistin er tann 3. juni 2002 kl. 14.00.
Umsókn við avritum av skjalprógvum skal sendast til:

Stýrið fyri Føroya Barnaheim
Pedda við Steinsgøta 10
FO-100 Tórshavn

Internet Sosialurin
www.sosialurin.fo

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.
tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

SUMMARDEKK
Fýra Michelin summardekk, 195/60 R15, til sølu fyri 800 kr.
Tlf. 315543 ella 224386

MAZDA 626 HB 2.0
árg. 9/87, el-rútar og el-sóltak, sýnaður 29/4-02, til sølu.
Tlf. 333776

HONDA ACCORD 2,0
árg. 92, við 15" sportsfelgum, til sølu.
Tlf. 250145, e. kl. 16

NISSAN SUNNY 1.6
árg. 87, nýsýnaður, pikadekk, summardekk og sportsfelgur v/ dekkum eru við. Ring og høyr nærri.
Tlf. 318775 ella 221939

MAZDA 323
árg. 2000, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 452170 - 210418 - 252084

TOYOTA COROLLA 1,3 XLI H/
til sølu. Árg. 92, koyrt 116.380 km, hvítur, sær sera væl út, vælhildin, 15" sportsfelgur, nýsýnaður, sera gott anlegg kann fylgja við.
Tlf. 220979

TOYOTA CAMRY 2.0 GLi
við 107 HK, árg. 85, koyrt 150.000 km, koyrir væl, góð summar/vetrardekk eru við + Sony anlegg. Prísuppskot 11.000 kr.
Tlf. 210808

TIL SØLU
Opel Ascona 1.8i, sýnaður 21.03.02, koyrir væl, til sølu fyri 10.000 kr.
Tlf. 314131

VW GOLF II 1,8 GT
árg. 88, til sølu fyri 20.000 kr.
Tlf. 218778

RESTPARTÍ
av dekkum til persónbilar og vørubilar. 125 kr. pr. stk. Brúktar alufelgur til BMW 3 og 5 seriu.
Tlf. 218778

OPEL ASTRA 1.6 Gl
Árg 93 í góðun standi, koyrt 111.000 km, til sølu fyri 36.000,- kr.
Tlf. 219110

HYGG HER
Sera væl hildin Toyota Carina E 2.0 GLi, árg. 95, koyrt 66.000 km til sølu.
Tlf. 315218

BÍLIGAN BIL?
Opel Kadett 1.3 SL árg.86, 126.000 km. Nýsýnaður, ongan kross og koyrir væl 9.000 kr.
Tlf. 214470 e.kl. 16.15

VIÐFESTISVOGNUR
Lítil viðfestisvognur til sølu.
Tlf. 422267

DATSUN SUNNY N13
(88) til sølu sum reservadeilir.
Tlf. 422267

GOLF
Ein Golf turbodiesel uttan plátur til sølu.
Tlf. 211555

VW POLO
árg. 87, biliga til sølu. Koyrir ikki. Nýggjan tanga. Hampulig dekk.
Tlf. 252696

NISSAN 2.0
diesel til sølu. El-rútar, sentrallás o.a. stereoanlegg kann fylgja við. Í sera góðum standi.
Tlf. 319954

OPEL ASCONA 1.6
árg 86 til sølu fyri 10.000 kr
Tlf. 252296

TIL SØLU
Ein Daewoo Lamos 99, 1,5i, hevur el-lás, sentr. lás, Pioneer cd-anlegg, sportsvel, sportsfelgur + pikadekk, powerstýring, 5 hurðar, koyrt 71.000 km.
Tlf. 225452

BMW 320 CI-COUPE
Árg. 94/11, koyrt 172.000 km, svartur, 17" sportsfelgur, cd-spælara, pikadekk á felgum. Hygg at bilinum á www.bil.fo
Tlf. 216690, Leivur

SEAT CORDOBA TIL SØLU
árg. 96, koyrt 85.000 km, grønur, sportsfelgur. Bilurin er keyptur í Danmark og hevur koyrt eitt ár í Føroyum.
Tlf. 310431

TOYOTA COROLLA
sýnaður 04-2002, árg. 87 til sølu.
Tlf. 210408

CITROEN SAXO 1.5D
árg. 8/99, koyrt uml. 57.000 km, til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 443388

RENAULT MEGANÉ 1.6e
árg. 3/99 koyrt 44.000 km, til sølu. Best eftir kl. 19.
Tlf. 447768 ella 220954

TIL SØLU
Toyota Carina II GLI 1,8 liftback, árg. 88, nýggj heilársdekk, 4 eyka felgur við dekkum fylgja við.
Tlf. 312159 ella 215159, e. kl. 16

TIL SØLU
Toyota Carina GLI 1,8, árg. 88, nýggj heilársdekk og fýra felgur við dekkum fylgja við.
Tlf. 312159 ella 215159

ELLISAKFAR TIL SØLU
Ein Volvo Amazon frá 1965 til sølu, er í góðum standi, nógv gjørt við hann, nýsýnaður.
Tlf. 224060

TOYOTA CARINA II 1.6
Nýsýnaður, árg. 10/86 til sølu.
Tlf. 220571

OPEL ASCONA
árg. 87 til sølu fyri 4.000 kr.
Tlf. 281297

FLØGUSPÆLARI
(Sony 10CD) til bil til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 317504

FORD SIERRA DIESEL 2.3
verður seldur sum eykadeilir. Motorurin í góðum standi. 5.000 kr.
Tlf. 423198

SPORTFELGUR TIL SØLU!
4. Orginalar Toyota alu. sportfelgur á dekkum til sølu fyri einans 3.500,- nýprísur er eini 8.800,-. Dekkini eru av merkinum »Michelin 195/65-14 MXT«. Dekk og felgur eru lítið og einki brúkt. Felgurnar passa til Carina, Avensis o.s.v við 5 holum.
Tlf. 218099

TIL SØLU
16" Sportfelgur 4 X 100, við 205/50 R16 dekkum, hava staðið á einum Opel Ascona passa eisini til aðrar bilar, felgurnar eru 1 1/2 ára gamlar. Nýprísur 10.0000 kr, til sølu fyri 4000 kr.
Tlf. 224725

FELGUR
við dekkum til sølu fyri 125 kr. pr. stk. Dekkini kunnu ikki nýtast.
Tlf. 310542

LEITAR TÚ
eftir góðum brúktum bili? Opel Vectra 2.0i árg. 92. Citroen Saxo 1.5 D, árg. 99.
Tlf. 314018 ella 213727

MAZDA 323
3 1/2 ára gamal, silvurlittur, centrallás, ABS bremsur, servo, airbags v.m. Sum nýggjur, bert koyrt 28.000 km – selist fyri hægsta boð yvir 90.000 kr.
Tlf. 321575 ella 210360

GÓÐUR MOTORUR
o.a. til Toyota Carina T151 árg. 87.
Tlf. 228347 ella 312515, Johan

TIL SØLU
sum eykalutir ein Toyota Carina T151, árg. 87 við góðum motori, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 228347 ella 312515, Johan

SPORTFELGUR
Fýra sportfelgur við fýra lítið brúktum Bridgestonedekkum (195, 50, R15). Nývirði 7.200 til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 264346 ella 441383

COROLLA DIESEL
3 ára gamal Toyota Corolla 2.0 D vælhildin, til sølu. Møguliga í býti við biligari bil.
Tlf. 264346 ella 441383

DAIHATSU CHARADE
árg. 6/87, er í hampuligum standi. Prísuppskot: 6.000 kr.
Tlf. 255591

HYGG HER!
Ein sera væl hildin Opel Astra st.car 2000 turbo diesel, árg 8/2001 við sóltaki, sportfelgur og eyka spildurnýggj pikadekk á felgum til sølu fyri 175.000 kr.
Ringið 424567 ella 250413

DIESELBILUR
biliga til sølu. Opel Ascona 1.6 D, árg. 87, sera økonomiskur og í góðum standi. Hevur 15" sportfelgur. Prísuppskot: 12.000,-
Tlf. 256900

SUZUKI SWIFT
árg. 86, til sølu sum eykadeilir fyri 2.500 kr. 3 Michelin + 1 Continental summardekk 165 R13 á felgum (Opel Ascona) til sølu fyri 1.000,-
Tlf. 251240

DAIHATSU CHARMANT 1.6 LC
er til sølu fyri biligan prís.
Tlf. 441671 eftir kl. 18

TIL SØLU
15 tumma sportsfelgur, 4 hol (4x98), passa m.a. til Fiat. Til sølu fyri 3000 kr.
Tlf. 219929 e. kl. 18

TOYOTA COROLLA 1.6
Árg. 87. Hevur nýtt stýrisystem og nýggja kobling. Koyrir sera væl. Til sølu fyri 23.000 kr.
Tlf. 252990 ella 312146, e. kl. 17

MAZDA 323 BD
árg. 85, koyrir væl, men krevur ábøtur. Eisini vælegnaður til eykalutir – til sølu.
Tlf. 422434

MAZDA 626 2.0D
árg. 87, koyrt ca 170.000 km, sýnsgóðkendur 9.11.01. Prísuppskot: 8-10.000 kr.
Tlf. 313824 best eftir kl. 17

YNSKIST
til Mitsubishi Pajero longra modell, árg. 1986 – vinstra og høgra hurð aftan.
Tlf. 313824 eftir kl. 17

SUBARU
Subaru 1.8 AK5, árg. 88, myrkareyður til sølu fyri 8.000 kr.
Tlf. 448439 ella 255158

TIL SØLU
3 sportfelgur bíliga til sølu.
Tlf. 448439

OPEL ASCONA 1.6S
árg. 86 til sølu fyri 5.500,- krevur ábøtur.
Tlf. 227165

TOYOTA COROLLA
sera væl hildin. Til sølu um hóskandi boð fæst.
Tlf. 214233 ella 372299

OPEL ASCONA 1.6S
4 hurðar, árg. 88, sóltak. Sýnaður í apríl 2002. Koyrt 146.000 km. Ikki er roykt í bilinum. Bilurin er í hampuligum standi. Vit kunnu tosa um prísin. Radio við cd-spælara fylgir við.
Tlf. 333219 ella 260019

Arbeiði

ARBEIÐI YNSKIST
15 ára gomul genta søkir arbeiði eftir skúlatíð og í summarfrítíðini.
Tlf. 424179

MÁLA HÚSINI
Alt uttandura málaraarbeiði verður gjørt skjótt og væl.
Tlf. 449149

MAÐUR
søkist at arbeiða upp á lastbilar.
Tlf. 311655

ALT FYRIFALLANDI ARBEIÐI
verður gjørt av tilkomnum handverkara.
Tlf. 310352

HÚSASMÍÐ OG UMVÆLING
Alt timburarbeiði verður gjørt, nýtt sum gamalt innan og uttan. Fa. Húsaumvæling,
tlf. 215214

Barnaansing

EG SÓKNIST
eftir konu í høvuðstaðarøkinum at ansa soni mínum (3 ár) meðan eg eri til arbeiðis. Best er, um tú hevur onnur børn/barn sjálv heima.
Tlf. 224946

BARNAANSING
Ynskist til 7 mán. gamlan drong frá 15. juni.
Tlf. 312166

Barnaútgerð

KOYRISTÓLUR
Vakur, ternutur koyristólur til sølu fyri 1.400 kr.
Tlf. 443329

BARNAVOGNUR
Ein myrkabláur Brio barnavognur bíliga til sølu.
Tlf. 375261

BARNASONG TIL SØLU
Brio-barnasong v/ madrassu til sølu, dýna, koddi, toykantur, 4 løk, 3 seingjarsett, babyteppi (selist samlað).
Tlf. 227044 e. kl. 16

KOYRISTÓLUR TIL SØLU
Myrkabláur Brio koyristólur við posa, sela og regnslag (selist samlað).
Tlf. 227044 e. kl. 16

TIL SØLU
Ein grá, leðurlook babylift, 300 kr. Baðikar á stativi, 300 kr.
Tlf. 448535

TIL SØLU
Pusliborð v/ baðikari, tveimum hillum og hjólum til sølu fyri 500 kr.
Tlf. 316817, e. kl. 18

BRIO KOYRISTÓLUR
til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 316817, e. kl. 18

TIL SØLU
Ein bláur barnabilstólur 9 -18 kg, til sølu fyri 500 kr. Ein barnarejsesong til sølu fyri 300 kr.
Tlf. 316022 ella 252922

RIMASONG
úr ljósum træi, við madrassu, bíliga til sølu.
Tlf. 447451

TIL SØLU
Myrkabláur combivognur + eitt systkinasetur til sølu fyri 2.000 kr.
Tlf. 455108

BRIO KOYRISTÓLUR
Ein grønur Brio koyristólur til sølu fyri 1.600,- kr. Bert nýttur til eitt barn. Sær gott út.
Tlf. 448439

Bátaútgerð

4-MANNAFAR
Glasfipur 4-mannafar við nýggjum motori til sølu.
Tlf. 214046

ÍSLENDSKT LÍNUSPÆL
av merkinum Haffspil til sølu. Hevur kippara og rullu.
Tlf. 221866

TIL SØLU
10-mannafar, glastrevja, við dekki, allari útgerð, 3 el-snellir, v/u fiskiloyvi.
Tlf. 286518

TIL SØLU
Eitt føroyskt bygt 7 mannafar við 10 HK SÁAB, línuspæli og rennu til sølu. Báturin sum krevur ábøtur hevur fiskiloyvi.
Tlf. 214693

6-8 MANNAFAR
ynskist til keyps.
Tlf. 211604 ella 321471 e.kl. 17

TIL SØLU
20 tons útróðrarbátur í góðum standi til sølu, um hóskandi boð fæst.
Tlf. 444761

TIL SØLU
Um nóg høgt boð fæst, er eitt væl útgjørt 8-mannafar til sølu.
Tlf. 217280, e. kl. 18 455211

LÍNUSPÆL VIÐ TILHOYRI
Línuspæl, 26 l. pumpa, 30 l. tangi úr rustfríum stál, trykventilur og slangur – alt í sera góðum standi – bíliga til sølu.
Tlf. 373576

Bingo

GOTT BINGO
verður í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 16. mai kl. 19.00. 15 plátur 100 kr. Nógvir góðir vinningar. 15 vinningar á lutaseðli. Eykaspæl. Koyring heim.
Argja Bóltfelag

FRÁ TÓRSHØLL
Gott bingo verður leygardagin 11. mai kl. 20. Øll eru vælkomin.
Tórshøll

GOTT BINGO
verður í Starvsmannafelagshúsinum J. H: Schrøtersgøta 9, mánakvøldið 13. mai kl. 19.00. Full pláta 400 kr. 6. og 12. spæl 600 kr. Nógvir góðir vinningar. M.a. á lutaseðlum 2 x 1000 kr. 2 x 500 kr. 15 plátur fyri 100 kr. Eykaspæl aftaná. Koyring heim aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Spastikarafelagið

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(sett X) undir teiginum:

❑ Akfør	❑ Amboð	❑ Arbeiði
❑ Barnaansing	❑ Barnaútgerð	❑ Bátaútgerð
❑ Bingo	❑ Bræváskifti	❑ Burturm./funnið
❑ Býli	❑ Bøkur	❑ Dansur
❑ Dýr	❑ Fundir	❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv	❑ Lutaseðlar	❑ Leikur
❑ Matur	❑ Pløgg	❑ Samband
❑ Súklur	❑ Teldur	❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp	❑ Ymiskt	❑ .....

in ana vao ni i i a a fi o a. .v. . a in i a a ai a v ao ni a i i. in a na i a a a fi o a i i a i f nn o na.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Frí frímerki